†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Bryndis Unadóttir** fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 12. Tey ið vilja minnast Bryndis, kunnu lata Gávugrunni Bryndisar til børn og ung við Diabetes eina peningagávu, konto í Eik banka.

Kistan við **Árna Debes** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 17 í Vágs kirkju. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Árna, kunnu lata eina peningagávu, konto í Suðuroyar Sparikassa.

Kistan við **Pouline Kathrine Nolsøe Hansen, Tórshavn**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið 26. februar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 27. februar kl. 14.

**Jona Joensen,** fyrverandi sjúkrasystir, ættað út Tórshavn, andaðist á Eldrasambýlinum Oman Hoydalar týsdagin, 90 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jonu, kunnu lata Eldrasambýlinum oman Hoydalar 6. eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Jógvan Pól Johan Egholm**, vanliga nevndur Jógvan Páll, andaðist í Ålborg, mánadagin 23. februar, 39 ára gamal.

# Hans Eli Dahl 65 ár



Leygardagin 28. februar fyllir Hans Eli Dahl í Havn, 65 ár.

Hans Eli er havnarmaður, sonur Edith, f. Jacobsen, úr Vestmanna, og Paula Dahl úr Havn.

Hans Eli er giftur við Birnu, f. Jensen, úr Froðba.

Hann tók lærarapróvg á Føroya Læraraskúla í 1967 og var lærari í Sørvági frá 1967-71, og í Tórshavnar Kommunuskúla skúlaárið 1971-72.

Umframt sína læraraútbúgving hevur hann útbúgving sum tali- og hoyrilærari. Í 1984 varð Hans Eli settur sum lesiráðgevi á Landsskúlafyrisitingini, og eftir at ráðgevingin í 1991 flutti á Skúlan á Trøðni, varð starvið umskipað til pedagogiskan ráðgeva. Hans Eli var stjóri á Sernámsdeplinum frá 2003 til 2008, tá hann gavst har.

---

†

Kistan við elskaðu dóttur og systur okkara

**Bryndis Unadóttir**

fer úr Landssjúkrahúskapellinum
fríggjadagin 27. febr. kl. 16.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin 28. febr. kl. 12.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna, Uni og Pætur**

Tey, ið vilja minnast Bryndis við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til gávugrunn Bryndisar, konta í Eik Banka (til børn og ung við diabetes)

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá kæri pápi, abbi og langabbi okkara

**Jákup Jacobsen**
Jákup á Báraldarbakka
í Vági

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri gávur til eldrasambýlið í Vági.
Tøkk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu
til við jarðarferðini.
Takk til starvsfólkini á eldrasambýlinum í Vági og
Suðuroyar sjúkrahúsi.
Takk til Patrick de Neergaard, prest, fyri troystarík
orð kapellinum og kirkjuni.
Takk til øll, sum fylgdi honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ebba og Magnus v/familju**

---

## Tøkk



Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá okkara
høgt elskaða mamma, vermamma, omma
og langomma

**Poula Jespersen**
Trongisvági

doyði og varð jarðað.
Takk til heimahjálpirnar og heimasjúkrasystrarnar.
Takk til G4 á Landssjúkrahúsinum.
Takk fyri góð og troystarrík orð í heiminum,
í Salem og á grøvini.
Takk fyri vakran sang og tónleik í salinum.
Takk til tykkum í Salem, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri vitjan, til tykkum, sum ringdu, og tykkum,
sum á annan hátt vístu samkenslu.
Takk til ommubørnini, sum vóru so góð við hana.
Takk fyri peningagávur til Salem, fyri blómur og
kransar og til tykkum øll, sum fylgdu mammu
okkara til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

**Martin, Jan, Ruth og Noomi**

*Sum dagar tínir eru, so skal styrki tín vera.*
***5. Mósebók 33,25***

---

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið
mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Gigga Jensen**
Kvívík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Kvívíkar kirkju.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jógvan og Kristian**

---

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 28. februar verður Andrias Nielsen í Sandavági 90 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum frá kl. 17.

**75 ára føðingardagur**
Mánadagin 2. mars, verður Hannefía Poulsen. Klaksvík, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Sjómans heiminum leygardagin 28. febr. kl. 18.00.

**45 ára føðingardagur**
24. mars fyllur Kári H. Debess, Sumba 45 ár, dagurin verður hildin í samkomuhúsinum í Sumba 21. mars kl. 19. Tey, sum vilja gleða meg við at koma í føðingardag, vinarliga sigið frá á telefon 274006 ella 218139 áðrenn 15. mars.

**Prógv**
22. januar fekk Joan Øregaard Størup úr Fuglafirði handað prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur frá University Collage Nordjylland.

**Prógv**
30. januar fekk Jógvan Øregaard úr Fuglafirði handað læknaprógv frá Syddansk Universitet í Odense.

---

**Dagurin**
**27. februar. Leander,** deyður umleið ár 600. Biskupur í Sevilla. Hann var harður mótstøðumaður av ariansku ranglæruni. Grikst navn, samansett av orðum, ið merkja gleði og menskur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*